


# ÚF sendir beinleiðis frá Jóansøkufestivalinum

**Leygarkvøldið vitjar Útvarp Føroya á Eiðinum í Vági, har Jóansøkufestivalurin 2006 fer fram og sent verður beinleiðis**

JÓANSØKU-FESTIVALURIN

Tað hevur ikki verið vanligt at senda beinleiðis av jóansøku, tó tað seinnu árini er hent nógv á hesum økinum og t.d. Norðoyarstevnan hevur verið varpað beinleiðis, eins og Ólavsøkan. Vit kenna eisini undansendingarnar, ið ofta eru undan stevnunum.

Men við Jóansøkufestivalinum eru nógvar broytingar í ár. Eitt er, at Smyril siglir, so tað hóskar betur til stevnu og festival, og har ein stór broyting er, at Smyril siglir norð aftur úr Vági til Havnar leygarkvøld klokkan 01:00, tá festivalurin endar.



*Elis Poulsen er annar verturin, tá ÙF sendir frá Jóansøkufestivalinum*

Annað er, at leygarkvøldið á jóansøku sendir ÚF beinleiðis frá Jóansøkufestivalinum.

Elis Poulsen og Dagfinn Olsen eru vertir, tá ÚF sendir beinleiðis frá Jóansøkufestivalinum og teir fara at hitta jóansøku- og festivalgestir og høvi verður at hoyra festivaltónleik og kenna ein farra av festival- og jóansøkuróminum beinleiðis.




